
DANSA
so væl og leingi
KARAVELLA MARIONETT-TEATUR

# Bílegg eina marionettsýning!



**Karavella Marionett-Teatur** hevur í hesum døgum møguleika at bjóða tykkum at bíleggja sýningar av nýskrivaði føroyska leikinum ***Dansa so væl og leingi*** í Norðurlandahúsinum. Hetta er ein leikur fyri bæði børn, ung, vaksin og tilkomin fólk (frá 7 til 97), ein lívssøga um at velja og liva sín dreym, men eisini um hvussu valini skapa sakn og longsul.
Tá er eisini møguligt at njóta framsýningina av øllum marionettunum hjá Karavella Marionett-Teatri og listaframsýningina Dreymrúm.

Hesar dagar er møguligt at bíleggja sýningar:

| | | |
|---|---|---|
| Mánadag | 18. apríl | kl. 10.30 og kl. 13 |
| Týsdag | 19. apríl | kl. 10.30 og kl. 13 |
| Mikudag | 20. apríl | kl. 10.30 og kl. 13 |
| Hósdag | 21. apríl | kl. 10.30 og kl. 13 |
| Fríggjadag | 22. apríl | kl. 10.30 og kl. 13 |
| Týsdagin | 3. mai | kl. 10.30 og kl. 13 |
| Mikudagin | 4. mai | kl. 10.30 og kl. 13 |
| Hósdagin | 5. mai | kl. 10.30 og kl. 13 |
| Fríggjadagin | 6. mai | kl. 10.30 og kl. 13 |

Hvør sýning kostar 3500 kr og pláss er fyri uml. 50 áskoðarum.
Ógvuliga áhugavert fyri øll hevði verið, um t.d. ein skúlaflokkur og ein stovnur við eldri bíløgdu sýning saman, so báðir partar fáa gleði av at uppliva saman. Hetta kunnu vit hjálpa tykkum at samskipa, um tit hava áhuga fyri tí.
Ring til 216596 at bíleggja ella fáa fleiri upplýsingar.
Eisini ber til at skriva til rakel@helmsdal.fo.



*"Ígjøgnum sýningina sóu vit sál, líðing, offur, kærleika, vakurleika, náði, ja satt at siga eitt blunk av ævinleika inn í ítøkiliga einstaklinga og felagsliga veruleikan."*
Hanna Jensen, forkvinna í Mentanarnevndini

*"Eisini var hetta ein stór søga við teim stóru kenslunum: kærleiki, at fylgja sínum dreymi, longsul (longsul í fleiri, fleiri løgum), vón, sorg, list og tráan, deyði, sakn og at finna heimaftur og kanska at finna eyðnuna, hóast alt."*
Gunnvá Zachariasen, sjónleikari

*"Innihaldsliga er leikurin sum eitt ævintýr, men tó eisini sum ein modernaður tekstur, har dulvitskan fær rúm gjøgnum dreym og tann visuelli tvídráttur millum dukkurnar elur fram ímyndan um nýggjan prosatekst. Evnini, ið verða viðgjørd, eru tey heilt stóru: kall, dreymur, varandi kærleiki, útlongsul og heimlongsul, men eisini trivnaður, list í samfelagnum, fjølbroytt samfelag, tað globala sett upp ímóti tí lokala v.m. Sum ævintýrið, er leikurin bygdur á frymilin heima-úti-heima – heima er í nærumhvørvinum (í Føroyum?) og úti er í París."*
Hanna Jensen, forkvinna í Mentanarnevndini

Meira um sýningina á heimasíðuni.

# UM KARAVELLA MARIONETT-TEATUR



Karavella Marionett-Teatur er eitt einkvinnu-marionett-teatur, sum hevur leitað sær aftur til røturnar av marionettleiki í Evropu: Eitt leikhús við snóradukkum, sum ferðast kring alt landið at hava framførslur.
Leikhúsið varð sett á stovn í 2011. Higartil hevur Føroya fyrsta marionett-teatur framleitt fýra leikir. Rakel Helmsdal hevur eisini fingið Barnamentanarviðrisløn Tórshavnar Býráðs í 2014 fyri leikuppsetaninar av bókunum um skrímslini og Veiða vind.
Handan verkætlanina er listakvinnan Rakel Helmsdal, sum ger leikrit, marionettir, búnar, pall, ljós og ljóð og spælir allar leiklutirnar. Hedvig Westerlund-Kapnas leikstjórnar. Ole Jakob Nielsen hjálpir við pallsmíði og ørðum praktiskum. Árni Baldvinsson og Kjartan Nolsøe Jespersen hava bygt upp tann tøknilig partin av leikhúsinum.

Tað ber til at bíleggja sýningar hjá Karavella Marionett-Teatri út á stovnar og skúlar, tað einasta, sum krevst, er, at tit hava eitt høli á støðd við eina vanliga skúlastovu, sum kann myrkaleggjast.
Men **til og við 6. mai** ber til at bíleggja sýning í Norðurlandahúsinum. Tá sleppa tit undan at gera høli til reiðar og fáa eisini sýningina nakað bíligari, enn um vit skulu koma út til tykkara. Samstundis hava tit høvi til at síggja framsýningina **"Hugurin flýgur"**, sum er í sama høli.



Listaverkið "Avstað"
á framsýningini "Hugurin flýgur".

Karavella Marionett-Teatur
att: Rakel Helmsdal
handan Á 3B
100 Tórshavn
tlf: 216596
t-postur: rakel@helmsdal.fo